## Vón fyri at russiska bannið verður tikið av

Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, og Birna Mørkøre, landsdjóralækni, hava verið á fundi við stjóran á russiska eftirlitsstovninum Rosselkhoznadzor, ið hevur um hendur veterinera eftirlitið í Russlandi. Á fundinum varð umrøtt málið um russiska innflutningsbannið av føroyskum fiski og fiskavørum til Russlands. Á fundinum varð avrátt, at veterineru myndugleikarnir í ávikavist Russlandi og Føroyum undirskriva eitt sokallað Memorandum of Understanding, ið ger greitt, hvussu arbeitt verður frameftir við at loysa málið um innflutningsbannið. Hetta Memorandum verður ætlandi undirskrivað miðskeiðis í januar mánaði í Berlin, tá bæði russiskir og føroyskir myndugleikar luttaka á tiltakinum Grüne Woche. Ætlanin er síðani, at russiskir eftirlitsmyndugleikar fremja nýtt veterinert eftirlit í februar mánaði. Eftir hesa eftirlitsvitjan verður støða tikin til, um innflutningsbannið verður tikið av.



## Eingin vil kappast við Eidesgaard

Eingin hevur hug at bjóða Jóannes Eidesgaard av til formansvalið í Javnaðarflokkinum. Javnaðarflokkurin hevur í kvøld og í morgin landsfund í Klaksvík, og formansval er á skránni hesaferð. Tá freistin fyri at stilla upp var úti, hevði eingin gjørt vart við seg, og Jóannes Eidesgaard heldur tí fram sum formaður í Javnaðarflokkinum.

# Fara at framleiða pulvur úr

**Eyðun Gaardbo, stjóri í Seanergy, sigur, at spanska fyritøkan hevur allar tær royndir, sum brúk er fyri. Tað merkir, at fyritøkan á Eiði hevur allar møguleikar at sleppa undan nógvum barnasjúkum. – Spaniumenn kenna hesa framleiðslu gjøgnum mong ár, og teir eru inni á marknaðinum. Tað er okkara fyrimunur, nú vit fara í gongd her norðuri, sigur bjartskygdi stjórin**



FRAMBROT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Í gjár var stór móttøka á virkinum Seanergy á Eiði, sum nú fer undir áhugaverda framleiðslu úr fiskaskræðu.

Nógv fólk vóru til móttøkuna, bæði umboð fyri myndugleikar, fíggingarstovn og vinnuna. Eisini vóru umboð fyri spanska samstarvsfelagið, sum eigur helvtina av partapeninginum í felagnum og hevur formannin í nevndini aftanfyri hetta frambrot innan føroyska vinnu, sum skjótil nú er settur á.

Føroya løgmaður, Kaj Leo Johannesen, var eisini við til móttøkuna, eins og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard. Umboð vóru úr vinnunevnd løgtingsins, og haðani bar Katrin Dahl Jacobsen eina heilsu.

Kaj Leo Johannesen tók ikki orðið við hesa løtu, men í práti við løgmann, ið eisini hevur royndir sum vinnulívsmaður, skiltist týðiliga, at hann er rættiliga spentur upp á og hugtikin av hesi ótraditionellu og spennandi verkætlan á Eiði.

### Á enskum

Tað er sjáldan, at ein stórur partur av tí, sum sagt verður við eina slíka móttøku í Føroyum, gongur fyri seg á enskum máli. Men soleiðis var á Eiði seinnapartin í gjár.

Røðan, sum stjórin í Seanergy, Eyðun Gaardbo, helt, var á enskum, og síðan hevði nevndarformaðurin í felagnum, spaniumaðurin Michael Junka, eina áhugaverda og drúgva frágreiðing um tað virksemi, sum stórfyritøkan í Spaniu fæst við, samstundis sum hann metti um tað samstarv, sum nú er byrjaði á Eiði.

Eftir at teir báðir høvdu greitt frá verkætlanini, sum er reist á føtur í neyvum samstarvi við sponsku fyritøkuna, høvdu fólk høvi at heilsa nýggja og spennandi tiltakinum.

### Brjaði samstarvið

Egil Olsen, sum eigur hugskotið aftanfyri hetta virksemi og var maðurin, sum í sínari tíð setti seg í samband við sponsku fyritøkuna, var fyrstur at siga nøkur orð, og nú vóru talurnar á føroyskum máli.

Egil greiddi frá, hvussu hann var komin í samband við sponsku fyritøkuna, og hann takkaði øllum, sum høvdu verið við til at gjørt verkætlanina møguliga – ikki minst Eik Banka í Føroyum.

Thordur Niclasen, sum hevur verið borgarstjóri í Eiðis kommunu, meðan verkætlanin er reist á føtur, fegnaðist og takkaði fyri, at kapitalur eisini fylgdi við, tá samstarv kom í lag við sponsku fyritøkuna.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, fegnaðist um hetta nýbrot, sum hann tók til og vísti á, hvussu hann longu í 2003 gjørdist varugur við, hvussu Egil Olsen brendi fyri hesi sak, sum hann tók til.

### Pengar í skræðu

Arbeitt hevur við hesi verkætlan síðan ár 2006, og nú er komið har til, at virkið á Eiði fer undir royndarframleiðslu. Tað er evnið kolagen, sum skal framleiðast úr fiskaskræðu og sendast á alheims heilsuídnaðarmarknaðin.

Eyðun Gaardbo, stjóri, sigur, at marknaðurin úti í heimi fyri hesum evni er velduga stórur – ikki minst tí, at henda framleiðsla úr skræðu av fiski, sum livir í saltvatni, er ikki so útbreidd, sum hann tekur til.

- Vit síggja stórar møguleikar í hesum, og ætlanin er í fyrstu atløgu at selja pulvur úr fiskaskræðu til Japans og Thailands. Seinni ætla vit okkum so inn á evropeiska og amerikanska marknaðin við pulvurinum.



*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, er sera fegin um verkætlanina á Eiði og heldur, at tað verða slíkar verkætlanir, sum vinnuliga koma at hála Føroyar fram á leið*

### Týðandi samstarv

Stjórin sigur, at høvuðsorsøkin til, at henda verkælan nú er vorðin veruleikin, er samstarvið, sum Seanergy hevur fingið í lag við sponsku stórfyritøkuna.

- Spanska fyritøkan hevur seksti ár á baki innan hesa "bransju". Nú hava vit teir við okkum. Teir virka evnið úr animalskar rávøru, meðan vit á Eiði fara at virka evnið úr fiskaskræðu.

Eyðun Gaardbo vísir á, at spanska fyritøkan hevur